# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



15. mars fekk Jónas ein lítlan beiggja, sum var 53 cm. Langur og vigaði 3.450 gr. Teir búgva í Herlev, og foreldrini eru Heidi og Fróði Madsen.



18. mars fingu Jóhann, Jørmund, Olga og Jógvan ein lítlan beiggja, hann vigaði 3850 gr. og var 55 cm langur. Foreldrini eru Torkil og Malena Hansen úr Fuglafirði



21. mars fingu Kirstin og Høgni Hammer, búsitandi í Herlev, eina dóttur. Hon eitur Eyð Høgnadóttir Hammer, vigaði 5040 gr. og var 56 cm. long

6. mars fingu Lisette og J. Hendrik Sigurstein, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4250 gr.

21. mars fingu Eva og Jákup Midjord, Hvalba, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3850 gr.

22. mars fingu Helen Hjelm og Hans Jákup Debess, Vágur, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3510 gr.

23. mars fingu Jákubina Thomassen og Brian Johannesen, Toftir, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3200 gr.

24. mars fekk Linda Toftegaard, Fuglafjørður, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4000 gr.

26. mars fingu Jógvan og Alexia Hentze, Sørvágur, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4300 gr.

27. mars fingu Gurli S. Joensen, Miðvágur og Vilhelm Hansen, Sandavágur, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3190 gr.

27. mars fingu Beinta Joensen og Mikkjal Miðalberg Johannesen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3300 gr.

28. mars fingu Barbara og Hallur Durhuus, Hoyvík, ein son. Hann var 58 cm. langur og vigaði 4635 gr.

28. mars fingu Irena og Signar Holm, 900 Vágur, ein son. Hann var 49 cm. langur og vigaði 3000 gr.

28. mars fingu Bettina Bonde og Carl Johan H. Simonsen, Århus, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4100 gr.

29. mars fingu Natascha og Poul Erik Johannesen, Vestmanna, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3720 gr.

## Niels Nattestad 60 ár

Í dag, fríggjadagin 31. mars, verður Niels Nattestad í Havn 60 ár. Natte er skúlastjóri í Venjingarskúlanum, og hann hevur á so mangan hátt og ikki minst í ítróttini verið við til at mynda føroyska samfelagið.



Natte er hvalbingur. Foreldrini vóru Ninna fødd Jensen (1917-94) og Asbjørn Nattestad (1914-96). Hon er úr Porkeri og hann úr Hvalba. Natte eigur eina systir, Beinta (1949). Hon er gift Erlandi Ludvig úr Vestmanna,og tey búgva í Havn.

Natte hevur búð í Havnini í hálvt hundrað ár. Hann kom norður í 1956, tá ið pápin fekk starv sum fangavørður í arresthúsinum. Í 1971 leyk Natte prógv á Føroya Læraraskúla, og síðani hevur hann arbeitt á Venjingarskúlanum. Í 1980 gjørdist hann varaskúlastjóri, og síðani 1996 hevur hann verið skúlastjóri. 1977-78 var hann á ársskeiði á Fróðskaparsetri Føroya, og í 1983 var hann í nakrar mánaðir á skeiði á Danmarks Højskole for Legemsøvelser. Harafturat hevur hann verið á øðrum skeiðum í eitt nú føroyskum og fyriskipan.

Í skúlahøpi hevur Natte millum annað verið nevndarlimur í Føroya Skúlabókagrunni 1980-85, limur í Landsskúlaráðnum 1995-1996, millum teirra sum í 1973 tóku stig til skúlaítróttardagin, fyrsti formaður í ítróttarlærarafelagnum, sum varð stovnað í 1975, og limur í musikkskúlanevndini hjá Tórshavnar kommunu.

Sum spælari og sum venjari, dómari, fyriskipari, nevndarlimur og formaður hevur Natte so at siga alla sína tíð verið uppi í ítrótti og serliga hondbólti. Sum blaðungur spældi hann fótbólt í B36, og hann hevur spælt flogbólt og verið FM vinnari við NFL og HB.

Serliga virkin hevur hann verið í Kyndli. Har kom hann á besta liðið í 1965, og hann helt fram til 1982. Natte hevur altíð havt serligan áhuga fyri ítróttarhagtølum. Tí verður her við heimasíðuni hjá Kyndli sum keldu staðfest, at Natte er skrásettur at vera tann Kyndilsspælarin, sum oftast hevur umboðað felagið – 665 dystir og 2168 mál! Av teimum eru 146 dystir á besta liðnum í landskappingini og 12 dystir í Europa Cup. Trettan ferðir var hann á Kyndla liðnum, sum vann FM, og 35 ferðir var Natte á hondbóltslandsliðnum.

Í Kyndli hevur Natte verið venjari og dómari. Hann hevur verið nevndarlimur 1966-67, 1970-76. 1979-85 var hann formaður í felagnum. Nú er hann skrivari og í blaðnevndini. Í sambandi við 50 ára føðingardagshaldið nú um dagarnar er hann við til at leggja minningarritið til rættis, sum ætlanin er skal koma út seinni í vár.

Síðst í seksti árunum var Natte formaður í Fót- og Hondbóltsdómarafelag Føroya. 1978-79 var hann limur í hondbóltsdeildini hjá ÍSF, 1984-88 var hann formaður í Hondbóltssambandi Føroya, og harafturat hevur hann havt eina rúgvu av øðrum álitisstørvum í ítróttinum. Millum annað var hann nevndarlimur og formaður í ungdómsog menningardeildini hjá ÍSF 1980-84, og hann var stjórnarlimur í ÍSF 1982-88. Natte var formaður í fyrireikingarnevndini undan Oyggjaleikunum, sum vóru í Føroyum í 1989. Tá ið ÍSF í 1989 í sambandi við 50 ára dagin gav minnisrit út, var Natte ein av trimum í ritstjórnini. Fyri ítróttarvirksemið hevur Natte frá ÍSF fingið gullmerki.

At Natte hevur verið og er ógvuliga virkin maður sæst eitt nú aftur í, at hann eisini hevur havt stundir til og hevur lagt arbeiði í LIONS, har hann var formaður 1995 - 1996, at hann hevur verið nevndarlimur og formaður 1987-1996 í valfelagnum hjá Sambandsflokkinum í Suðurstreymi, Føroya Væl, og limur í landsstjórnini í Sambandsflokkinum 1991 – 96. Hann var eisini blaðstjóri á avhaldsblaðnum Glaðustrok í 1980 og 1981.

Í fleiri ár hevði Natte saman við øðrum forlagið Dropan. Aðalmálið hjá teimum var at geva dygdar barnabøkur og ungdómsbøkur út. Bæði uppruna bøkur og umsettar bøkur. Natte hevur umsett barna- og ungdómsbøkur og eisini onkran sjónleikin.

Frá 1989 og næstu sekstan árini legði Natte saman við Sverra Egholm, sála, til rættis jólaheftið Birting, og frá 1994 og fram til 2005 var hann nevndarlimur í Leikpalli Føroya.

Tað sigur seg sjálvt, at maður, sum hevur fingist við so nógv, er óvanliga arbeiðssamur. Skoðsmálið, sum hann fær frá teimum, sum hava arbeitt saman við honum, er, at hann er álítandi, hevur bæði beinini á jørðini og hevur samstundis visjónir. Natte dugir væl at skemta, hann er áhugaður í fólki og slekt, og at hann fylgir væl við og hevur stóra almenna vitan, hevur eitt nú verið staðfest, tá ið hann hevur luttikið í spurnarkappingum í útvarpinum.

Natte giftist 8. mars í 1969 við Oddvá fødd Joensen og ættað úr Syðrugøtu. Børnini hjá teimum eru Finnbjørg, Beinta og Ásbjørn. Tey búgva øll í høvuðsstaðnum, og Natte eigur sjey abbabørn (tað 8. er á veg) 4 dreingir og 3 gentur.

Føðingardagurin verður hildin leygardagin 1. apríl á arbeiðsplássinum saman við starvsfólki, familju, vinum og kenningum.

## Listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík

TÍÐINDASKRIV

7-11 apríl skipa Samverkamenn fyri listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Høvið verður at keypa listaverkini, ið sýnd verða fram. Listafólkini, sum hava latið sínar málningar til átakið eru: Ásla Rannvá Svensson, Edith Mørkøre, Eli Smith, Eyðun av Reyni, Hedvig Jóhansdóttir, Kári Svensson, Ólavur á Váli, Petur Prent og onnur.




Samverkamenn er ein føroyskur trúboðarafelagskapur, ið serliga arbeiðir ímillum asiatar og muslimar. Lærisveinaskúlin er ein verkætlan, ið gevur pakistanum, ið lítlar og ongar møguleikar hava at fáa bíbliuundirvísing, møguleika fyri, í 30 dagar, at koma til eitt leguhús og fáa góða og viðkomandi bíbliuundirvísing.

Smiðjan verður opin dagarnar 7-11 apríl frá kl.15-20, leygardagin og sunnudagin verður tó opið frá kl. 13-21. Til ber at lesa meira um tiltakið og síggja nøkur av listaverkunum á heimasíðuni www.samverkamenn.org.

**75 ár**
Leygardagin 1. apríl fyllir Una Hentze, Tórshavn, 75 ár. Hon er burturstødd føðingardagin.

**Prógv**
Tann 24. mars fekk Hildigunn P. Joensen, Leirvík, prógv sum løgfrøðingur við Universitetið í Keypmannahavn.

**Konfirmatión í Danmark**
Sunnudagin 2. apríl konfirmerast í Nakskov Jón Mohr Olsen, Hósvík, sonur Ellu Olsen, Hósvík og Bjarna Mohr, Tórshavn. Adr.: Svingalsallé 39, 4900 Nakskov.